# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

Jórun Thomsen, Sumba:

## 25 ára starvsdag hjá Heimahjálpini



Hósdagin 15. mars 2007 hevur Jórun Thomsen í Sumba arbeitt hjá Heimahjálpini (Nærverkinum) í 25 ár.

Jórun er fødd 16. mai 1951 í Sumba, har hon eisini er uppvaksin. Foreldrini vóru Jacobina og Fritjof Thomsen.

Jórun eigur fýra børn og seks ommubørn.

Færøernes Mellem- og Realskole:

## Realskúlamynd 1951



Í sambandi við eina framsýning sum verður á ólavsøku í ár í gamla realskúlanum í Havn leitar Jórunn Dánialsdóttir eftir myndum av lærarum og næmingum í "Færøernes Mellem- og Realskole" í tíðarskeiðnum 1916 til 1966. Jórunn heitir á tey, sum eiga myndir frá hesum tíðarskeiði, um at ringja til sín á tel. 316024 ella 226024. Adressan er Sílagøta 3, FO-100 Tórshavn. Myndirnar kunnu eisini latast inn "navnmerktar" í Wrangler Shop í N. Finsensgøtu 23 (tel. 314710).

Í dag hava vit hesa myndina, sum er frá 1951, tikin uttan fyri realskúlan.

**Aftara rað:** Sólrun Mohr, Bjarni Olsen, Asbjørn Simonsen, Carl Vilhelm Weihe, Anna Poulsen og Katrin Thorkildshøj

**Fremra rað:** Dan Mortensen, Peter Poulsen, Arnold Karbech Mouritsen, Heðin Samuelsen, Helena Restorff Jacobsen og Sheila Marr.

**Sitandi fremst:** Tórbjørn Mikkelsen og Knút Lützen

Um onkur hevur okkurt at viðmerkja viðvíkjandi hesum myndum, er viðkomandi vælkomin at seta seg í samband við Jórunn Dánialsdóttir.

*Myndaeigari: Sólrun Holm*

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Lilly Øster** fer úr kapllinum á Suðuroyar sjúkrahusi fríggjadagin kl. 18. Jarðarferðin verður úr Tvøroyrar kirkju leygardagin kl. 13.

**Ellindur Olsen úr Skálavík** andaðist á Áargarði á Sandi sunnudagin 11. mars, 82 ára gamal. Jarðarferðin verður úr Skálavíkar kirkju hósdagin kl. 13. Sungið verður úr sálmabókini.

Kistan við **Juliannu Sivertsen**, fødd Nystrøm, Klaksvík fer úr kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi í kvøld kl. 18.00 heim í Betesda. Jarðarferðin verður hósdagin kl. 13.30.

**Edith Klein, Strendur**, ættað úr Sørvági, andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimin 13. mars 99 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin 16. mars kl. 18. Jarðarferðin verður úr Nerija á Skála leygardagin 17. mars kl. 14.

Kistan við **Jákup í Uppistovu** fer úr Landssjúkrahúskapellinum í dag klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Leirvíkar kirkju Hósdagin 15. mars klokkan 14.

## Tøkk

Hjartaliga takki eg tykkum øllum, sum á ymiskan hátt mintust meg á mínum 80 ára føðingardegi 12. februar.

**Bestu heilsanir**
**Martha Ludvig, Hvalba**

†

Kunngjørt verður fyri ætt vinum og kenningum at

**Jákup í Uppistovu**
Leirvík

andaðist á Landssjúkrahúsinum sunnudagin 11. mars, 80 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskappellinum mikudagin 14. mars kl. 17.00.
Jarðarferðin verður úr Leirvíkar Kirkju hósdagin 15. mars kl. 14.00.

*Vegna tey avvarðandi*
**Victoria og Jógvan Evald**

*Tey, ið ynskja at minnast Jákup, kunna geva Missiónshúsinum í Leirvík eina peningagávu, konta í peningastovnunum*

**Dagurin**

**15. mars. Sakarias**, deyður ár 752. Hann var grikki, ið var valdur til páva í 741. Hebráiskt navn, ið merkir: Guð hevur minst til mín. 15. til 21. mars vóru róptir gandadagarnir. Teir vóru sera óálítandi til veður.